Hendan ogn verður lýst til sølu:

# Hús í Bringsnagøtu, Tórshavn

Vegna Føroya Skiftirætt verður ognin Bringsnagøta 10 lýst til sølu.

Grundøkið er uml. 110 $m^2$

Húsini eru í tveimum hæddum, uml. 85 $m^2$ hvør og treingja til ábøtur.

Føroya Skiftirættur tilskilar sær rætt til at velja millum tilboð, ið koma inn, og til einki at góðtaka.

Nærri fæst at vita um ognina við at venda sær til skrivstovu okkara:

**Advokatskrivstovan**
**Fr. Petersensgøta 9**

Halgir Winther Poulsen, adv. — Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv. — Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv. — Niels Winther Poulsen, adv.

**Tlf. 311145**

# Ruskinnsavnari til meginøkið hjá IRF

Søkt verður eftir einum ruskinnsavnara til meginøkið, sum umfatar Eysturoy og Norðstreymoy, at byrja 6/3-2000, ella skjótast tilber.

Arbeiðið umfatar:
I. Innsavnan av húsarhaldsposum
II. Heintan av burturkasti frá virkjum og bingjuplássum
III. Umframt annað fyrifallandi arbeiði hjá IRF.

Krøv til umsøkjaran:
I. Stóra koyrikortið, og vanur at koyra lastbil.
II. Skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Galdandi sáttmáli:
Lønarsáttmáli fyri fastløntar millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi innan hósdagin 2/3-2000.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 443343 ella 212843, Heðin Zachariasen.

IRF **Postboks 39**
**520 Leirvík**

# Umhvørvisleiðari

IRF søkir við hesum eftir umhvørvisleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Umhvørvisleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran.

Talan er um eitt heiltíðarstarv, og tann, ið settur verður, hevur m.a. hesar uppgávur:

- vera við at menna viðgerðina av burturkasti
- fylgja við í rákinum innan viðgerð av burturkasti
- røkja sambandið við myndugleikarnar á umhvørvisøkinum
- fylgja við á lóggávuøkinum innan umhvørvi
- hava ábyrgd av innsavning og viðgerð av vandamiklum burturkasti
- menna mannagongdir og edv v.m. innan skráseting og bólking av burturkasti
- skipa fyri innaneftirliti á t.d. Brennistøðini, tyrvingarplássum og Spilloljuverkinum.

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setir krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Tann, sum settur verður í starv skal hava hægri útbúgving innan t.d. verkfrøði. Kunnleiki til umhvørvi og viðgerð av burturkasti er ein fyrimunur.

Nærri fæst at vita við at tosa við Sólrun Poulsen ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

IRF
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvík, **innan 16. mars**

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*
*IRF ger hetta arbeiði fyri kommununar.*
*Arbeiðið fevnir um innsavning og viðgerð av burturkasti í øllum limakommununum.*
*IRF hevur eina brennistøð, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*
*Uml. 50 fólk eru í føstum starvi hjá IRF.*

# Fíggjarleiðari

IRF søkir við hesum eftir fíggjar- og roknskaparkønum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Fíggjarleiðarin hevur beinleiðis tilvísing til stjóran.

Talan er um eitt heiltíðarstarv, sum m.a. fevnir um:

- uppseta mánaðar- og ársroknskapir og fíggjarætlanir
- fíggjarstýra útlán og innistandandi, innan- og uttanlands
- starvsfólka- og sáttmálaviðurskifti
- menna mannagongdir og edv v.m. á fíggjarliga økinum
- ábyrgdina av dagliga bókhaldinum, har trý fólk arbeiða

Allar skrásetingar verða dagliga førdar á teldu, og er tað tí avgjørt neyðugt, at umsøkjarin hevur góðan praktiskan og teoretiskan kunnleika til skrivi-, rokni-, og telduarbeiði. Kunnleiki til Concorde Axapta og SQL er ein fyrimunur.

Arbeiðið er sjálvstøðugt og fjølbroytt, hevur nógvar persónligar menningarmøguleikar, eins og tað setir krøv til góð samstarvsevni, menniskjansligan og fakligan førleika. Alt hetta í einum góðum arbeiðsumhvørvi.

Lønin verður sett eftir avtalu.

Hevur tú hollar royndir innan bókhalds-, roknskapar- og fíggjaryrkið, við ástøðiligari útbúgving, eitt nú cand. merc., HD ella aðrari viðkomandi útbúgving, ert tú møguliga tann, vit søkja.

Nærri fæst at vita við at tosa við Sólrun Poulsen ella Poul Andrias Joensen, tlf. 443343.

Skrivlig umsókn við avriti av prógvum og møguligum ummælum verður at senda til:

IRF
att.: Poul Andrias Joensen
Postboks 39
FO-520 Leirvík, **innan 16. mars**

***IRF hevur til endamáls:***
*Sambært umhvørvisverndarlógini hava kommunurnar ábyrgdina av innsavning og viðgerð av burturkasti.*
*IRF ger hetta arbeiði fyri kommununar.*
*Arbeiðið fevnir um innsavning og viðgerð av burturkasti í øllum limakommununum.*
*IRF hevur eina brennistøð, seks tyrvingarpláss, umlastingarstøð, ruskbilar, oljureinsiverk, lastbila- og bingjuverkstað, slamsúgvarar og rottangatænastu.*
*Uml. 50 fólk eru í føstum starvi hjá IRF.*


*Allar støddir*
- **Rundsagabløð**
- **Diamantskivur**
- **Skeriskivur**

*Vit hvessa eisini*



**Tórshavnar Maskinhandil**
v/Tummas Andreasen
Varðagøta 29-30
100 Tórshavn • Tel. 313442

**Vit bjóða breitt úrval av inventar til:**
- Goymslur
- Arkiv
- Vørubilar
- Arbeiðsrúm

Sosialurin - 311820

*Tosið við okkum!*
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli
Tel. 315600 - Fax 318008

**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**




**GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR**
**Tlf. 32 22 22**


# Umboðsmannaval

Samb. § 28 í høvuðsamtyktini verður lýst til val hósdagin 30. mars 2000.

4 umboð í Tórshavnar valdømi standa fyri vali.

Havnar SJÚKRAKASSI

Uppskot til umboð skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi ikki seinni enn 16. mars 2000.

**Havnar Sjúkrakassi**
**Box 326 • 110 Tórshavn**



## Søkt verður eftir
# TEKNISKUM LEIÐARA
## til Skipasmiðjuna á Skála

**Starvið:**
Sum tekniskur leiðari fær tú ábyrgdina av øllum tekniskum spurningum á Skipasmiðjuni. Tekniski leiðarin verður partur av leiðslu felagsins við beinleiðis tilvísing til stjóran. Tekniski leiðarin skal vera við til at menna virkið tekniskt, somuleiðis sum hann skal viðvirka til at styrkja verandi virksemi og finna nýggjar møguleikar fyri øktum virksemi. Arbeiðsplássið er á Skála.

**Høvuðsuppgávur:**
- at vera tekniskt tengjulið millum virkið, viðskiftafólk og myndugleikar
- at vera við til at leggja ætlanir fyri arbeiði og menning av virkinum
- at vera við til at mynda leiðsluna á virkinum bæði dagliga og við framtíðini í huga
- at vera formonnum og starvsfólki annars til hjálpar í tekniskum spurningum
- at leiða tilboðsrokning og gera metingar av arbeiðum sum heild, bæði fíggjarliga og hvat viðvíkur tíð

**Førleikar:**
Vit rokna við at tú:
- er maskinverkfrøðingur og/ella hevur víðkað maskinmeistaraprógv
- hevur góð samskiftis- og samstarvsevnir
- hevur evnir at greina tekniskar trupulleikar, viðgera møguleikar til loysnir og ert før/ur fyri at taka avgerðir
- dugir væl at málbera teg á føroyskum, skandinaviskum og enskum máli, bæði skrivliga og munnliga

**Vit bjóða:**
Eitt sjálvstøðugt arbeiði við góðum møguleikum fyri persónligari menning. Løn, trygging og eftirløn eftir nærri avtalu partanna millum.

Um hetta hevur tín áhuga ella um tú hevur spurningar hesum viðvíkjandi, vinarliga set teg í samband við okkum á tlf. 441155.

Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Skipasmiðjan á Skála**
att.: Jón Danielsen
FO-480 Skála

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði og freistin at lata inn er 10. mars 2000.

SKIPASMIÐJAN
Á SKÁLA
**www.faroeyard.fo**
**skala@faroeyard.fo**

P/f Skipasmiðjan á Skála er dóttirfelag hjá P/f Tórshavnar Skipasmiðju. 75 fólk starvast á Skipasmiðjuni, sum í løtuni hevur sáttmála við Føroya Landsstýri um nýggja Sandoyarferju, ið skal latast um ársskiftið.

*Halt* sosialin

LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Verkfrøðingur/ Byggifrøðingur

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi til vegaumsitingardeildina hjá stovninum at byrja skjótast til ber.

Landið er býtt í 4 vegaumsitingarlig øki og talan er um starvið sum økisleiðari fyri Streymoynna og Vágarnar.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávan er at hava umsjón við vegakervinum, gera uppskot til, skipa fyri og hava eftirlit við arbeiðinum innan størri ábøtur, trygdartiltøk, vanligt hald, vetrarhald o.a.

Tann ið settur verður, skal eisini rokna við at koma at arbeiða við øðrum uppgávum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi við hollari ástøðiligari útbúgving og við góðum kunnleika til edv. Útbúgving sum handverkari hevur fyrimun, men er eingin treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmálanum millum fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda til: Landsverkfrøðingin, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinsta lagi 20. mars 2000.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf. 311333, lokal 212.

**Landsverkfrøðingurin**

**Reyði krossur Føroya**

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar allar dagar frá kl. $17^{00}$ til $23^{00}$

☎ **212380**


**bobcat** *-maskinurnar sum halda!*

- **Gravmaskinur** *–nógv model*
- **Lessarar við óteljandi møguleikum!**

**Vælegnaðar til byggivirkir, entrepenørar, bøndir, jarðarbrúk o.a.**



***Keyp góðsku – keyp Bob Cat!***

Sosialurin - 311820

**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008


NORÐURLANDAHÚSIÐ

# Avloysari søkist

Søkt verður eftir avloysara til køkin at byrja 15. mars 2000.

Starvstíðin verður til 1. september 2000.

Smyrjibreyðskona ella fólk, sum hava royndir at arbeiða í køki hava fyrimun.

Umsóknir verða at senda til:

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
Postboks 1260 • 110 Tórshavn

**Att.: Hjørdis Jespersen, køksleiðari**

Freistin at søkja er 1. mars 2000.

# Nordleik 2000
## í Stavanger týsdagin 4. til leygardagin 8. juli

Stóra norðurlendska fólkadansistevnan NORDLEIK 2000 verður í Stavanger í summar.

Øll dansifeløgini hava fingið skrá og tilmeldingarseðil, har **hvør einstakur skal velja:** ferðing (við Atlantsflogi ella við Norrønu), gisting, mat, skeið, framsýningar, útferðir o.a.

Tey, sum enn ikki hava teknað seg, kunnu venda sær til dansifeløgini ella **Hervør Durhuus, 350 Vestmanna, tlf. 424173** sum skjótast og í allar seinasta lagi mikudagin 1. mars.

*SLÁIÐ RING*
*Landsfelag Føroyskum dansi at frama*

# Flyting

Vegna flyting er Bókamiðsølan stongd frá 28. feb. til 6. mars.

Latið verður uppaftur 6. mars á Óðinshædd 2, Tórshavn.

**Bókamiðsølan**
Tlf. 313756

# Skrivari søkist

FFS søkir skrivara 4 tímar um vikuna. Løn eftir avtalu.

Umsókn verður at senda til

**Føroya Fimleikasamband**
Postboks 223
FO-110 Tórshavn